# Til Moskva á Fiskivinnustevnu

FISKIVINNUSTEVNA
*Tíðindaskriv*

Menningarstovan hevur tikið stig til at luttaka á eini framsýning í Moskva saman við russiska konsulátinum. Framsýningin, FISH 2004, verður 21. - 24. apríl. Hetta er ein fiskivinnuframsýning, og er hon ma. áhugaverd fyri føroyingar, tí russisk reiðarí hava játtað at møta okkum har. Hesir marknaðarføringsmøguleikar verða m.a. sæddir í átakinum:

- Vísa á okkara strategisku plasering í Atlantshavinum
- Skipasmiðjur
- Veitingar og tænastur, sum føroysk virki kunnu veita russiskum trolarum
- Havnir og frystigoymslur
- Keyp og sølu av fiski/kvotum

Russiski marknaðurin er í støðugum vøkstri, marknaðurin fyri ymisk fiskasløg er góður, og útlitini eru góð fyri marknaðin. Herfyri var í sjónvarpinum sagt frá um góða prísin á smáum upsa, og eisini hava vit fingið líknandi ábendingar um laksamarknaðin.

Aðrar vinnur, sum kundu komið uppá tal sum luttakarar eru byggivinnan og oljuvinnan. Innan oljuvinnuna er áhugi hjá russum at flyta tungolju til Føroyar, soleiðis at russisku skipini koma higar at bunkra, og hetta virksemi kann jú hava ringvirkningar.

**Føroyskur landabásur**

Menningarstovan hevur bílagt eitt básøki. Her fara russisk reiðarí og onnur áhugað at møta føroysku fyritøkunum til skipað fundarvirksemi. Tiltakið verður skipað sum landabásur.

Føroyskar fyritøkur verða bodnar við á føroyska básin á framsýningini. Hetta er eitt einastandandi høvi til at knýta sambond við russiska vinnulívið. Russiska konsulátið hjálpir við at knýta sambond við russisk reiðaríir, og Menningarstovan veitir sambond við aðrar partar av russiska vinnulívinum, sum kunnu hava áhuga fyri Føroyar og føroyskt vinnulív.

Fyritøkur, sum luttaka á landabásinum, njóta hesar fyrimunir:

- Atgongd til skipaðan fundarbás
- Tulkahjálp: russiskt/-føroyskt og enskt/føroyskt
- Teldu- og Internetatgongd á bási
- Egið logo á básinum
- Við í felags lýsingum
- Innboðið tiltak á básinum
- Við í framsýningarkatalogi við navni, adressu og stuttari lýsing av fyritøkuni
- Marknaðarupplýsingar um Russland (Møguligt eykagjald fyri upplýsingar frá donsku uttanríkistænastuni)

Básluttakarargjaldið fyri hesar tænastur er sett til Kr. 12.500,- fyri hvørja fyritøku.

Freistin at tekna seg er 18. mars.

Flogfelag Føroya skipar fyri beinleiðis ferð til framsýningina.

# Ógvusligur samanstoytur á Tvøroyri

**Ikki færri enn tríggir lastbilar og ein persónbilur vóru við í einum ógvusligum samanstoyti á Tvøroyri fyrrapartin týsdagin**

FERÐSLA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Ikki færri enn tríggir lastbilar og ein persónbilur vóru við í ógvusliga samanstoytinum á Tvøroyri týsdagin*

*Mynd: Leivur Nygaard*

Óhappið hendi um tíggjutíðina fyrrapartin týsdagin, tá ið ein seyður leyp út á vegin beint framman fyri tann eina lastbilin. Hesin lastbilur noyddist at støðga heldur harðliga fyri at sleppa undan at koyra á seyðin. Ein lastbilur, ið koyrdi beint í hølunum á tí fremra, megnaði ikki at steðga, áðrenn hann rendi í afturpartin á fremra lastbilinum.

Tann fremri lastbilurin bleiv av stoytinum skumpaður yvir á ein triðja lastbil, ið stóð og helt av, og hesin helt so leiðina fram í ein parkeraðan persónbil, ið fór gjøgnum eitt stakitt inn í ein urtagarð.

**Eingin fólkaskaði**

Sýslumaðurin í Suðuroy, Sommer Joensen, sigur við Sosialin, at tíbetur var eingin fólkaskaði, men nokk so fitt av materiellum skaða var. Hann sigur eisini, at allarhelst er tað bilførarin á aftara lastbilinum, ið fær ábyrgdina av óhappinum, tí at hann ikki hevur havt neyugu fjarstøðuna til lastbilin, ið koyrdi frammanfyri. Sommer Joensen sigur eisini, at bilarnir ikki koyrdu skjótt, neyvan meiri enn okkurt um 40-50 kilometrar um tíman, og hann leggur afturat, at tað var sera óheppið, at persónbilurin skuldi fara inn í urtagarðin, tí tað var einasta hús nær námind.



*Hesin lastbilurin skumpaði parkeraða persónbilin inn gjøgnum ein garð og inn í ein hava*

*Mynd: Leivur Nygaard*

# M/B Vesturland FD 306 1970 Eiði



Ja! Hetta snotuliga fiskifarið Vesturland, man hava stríðst fyri seg – her hugsi eg um manskapið, ið stríddist á sjónum fyri at skaffa útflutning og mat »í hjallin«.

Báturin er annars sera snøggur og hevur havt fiskiloyvi til garnafiskiskap, so sum svartkalva og havtasku.

Alt hetta er góður fiskimatur og ikki er neyðugt »at smæðast burtur« við at servera fiskimat á borðið. (Onkur tvs. fiskimaðurins kal føða »pisurnar« ið svangar eru).

Annars er báturin smíðjaður á Tórshavnar Skipasmiðju og er útgerðarbátur í dag.

Tekning og ummæli: Jógvan Háfjall.


Í Býin Í Býin

AUTO 311234
Dag og nátt - Alt døgnið



LAT OKKUM KOYRA TEG TIL OG FRÁ
VIT KUNNU EISINI KOYRA ØRINDIR FYRI TEG
BENZIN · DIESEL · KIOSK
Talutíðarkort: Kall · Føroya Tele
AUTO TEL 311234
Sosialurin 341800

club KAGGIN
Hóskvøldið spæla
GóGó Blúes
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Fríggjakvøldið spæla
AUDIO
Leygarkvøldið spæla
AUDIO
www.kaggin.fo
Sosialurin 341800

PLATFORM eclipse



PLATFORM
fríggjakvøldið: discoteque við:
OTTAR Í FUNNINGSSTOVU
OPIÐ FRÁ KL. 23.00-04.00
Ókeypis atgongd
Alt 1/2 prísur til kl 2.00
leygarkvøldið: discoteque við:
DJ LASSE (DK) (Jacques)
OPIÐ FRÁ KL. 23.00-04.00
eclipse night club
fríggjakvøldið: discoteque við:
DJ LASSE (DK) (Jacques)
OPIÐ FRÁ KL. 23.00-04.00
leygarkvøldið: discoteque við:
DJ RÚNI KJÆR
OPIÐ FRÁ KL. 23.00-04.00
CAFÉ NATÚR
Hóskvøldið og fríggjakvøldið:
KIM HANSEN & JAMES OLSEN
UNPLUGGED

felagið Tórshøll
í vikuskiftinum spæla
FRIENDS
Leygarkvøldið 20. mars kl. 20.00 - Bingo
Ókeypis atgongd í kjallaranum fríggjakvøld og leygarkvøld

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Koyrt verður leygarkvøld:
Vágaleiðin (tlf. 217753)
• Úr Vágunum — bert eftir avtalu
• Tórshavn - Vágar — kl. 04.30
Vestmannaleiðin (tlf. 217752)
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
• Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
• Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254



BÍLEGG PIZZA
FRÍGGJANÁTT
OG
LEYGARNÁTT
HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA
PIZZA 67
TEL. 35 67 67

fk Matseðilin
Hósdagin 18. mars:
Stokt flesk
v/ persillusós
Fríggjadagin 19. mars:
Rullusteik
Leygardagin 20. mars:
Enskan búff
Mánadagin 22. mars:
Kjøtbollar í karrysós
Týsdagin 23. mars
Gyros
Mikudagin 24. mars
Kalkunsnitzel
***
Seinnaparts-
TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 30,00
Matstovan
í Hoyvík







